*Framhald av síðu 10*

leiðum í nøkur ár strikaði verandi landsstýrismaður í síni merkiligu umsorgan fyri ídnaðarbátunum 62 stig í loyvinum og øll skipini kunnu nú fiska 1000 tons hvør frítt, har sum vit kunnu fiska norðhavssild - ella í veruleikanum eini 15.000 t afturat av norðhavssild, uttan at landsstýrimaður hevur boðað frá nøkrum. Kravið um at fiska hetta við nót er eisini strikað og bert teir, sum hava strongt mest á hava fingið hesi boðini.

Í ár hevur nógv sild verið á hesum leiðum heilt suður móti 61 stigum. Stór og góð sild, sum hevur verið væl egnað til framleiðslu í Kollafirði. Ein megnar møguleiki at kanna sær ein bita og til at styrkja møguleikarnar fyri at menna eitt pelagiskt virki í Føroyum, men eingin hevur gjørt nakað fyri nakað fyri at stuðla hesum tankagangi. Um ein sild hevur eitt navn eftir sínum eyðkennum ella hvar hon er at finna má vera ein definitiónsspurningur.

Nøkur skip hava roynt við nót eftir henni og fingið hampuligt burtur úr, men tá íð tað frættist at onkur varð sloppin at fiska hana við troli, var eingin grund hjá hesum ikki at gera tað sama.

Ein skuldi trúð, at hesi tíðindi um sild høvdu áhuga fyri ta nevndina, sum landsstýrismaðurin hevur lovað skal geva svar upp á alt tað, sum hann ikki hevur kunnað svara upp á. Men onkur má bera teimum tíðindini.

Og neyðars Fiskiveiðueftirlit. Ongan verðsins møguleika fyri at umsita vavgreytin.

Tað er einki skil í okkara fiskivinnuumsiting. Hann sum situr næstur og er drúgvastur at banka upp á í Fiskimálaráðnum fær sín vilja - og vit aðrir frætta umsíður, men fáa ikki alment nakað at vita. Eingin politikkur, bert stýring eftir trýsti. Hetta má broytast. Kanska hevur nevndin eisini eitt uppskot til loysn av hesum?

Onkur fer kanska at spyrja, um eg ætli mær at halda áfram við at eygleiða og harta fiskivinnuumsitingina. Eg eri jú fráfarin sum formaður í Felagnum Nótaskip og givin sum reiðari. Jú, eg ætli mær at halda áfram. Nú eri eg bert ein av ognarunum til "livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og tey rættindir, føroyska heimastýrið við samráðingum hevur rokkið ella eftir altjóðarætti eigur uttan fyri føroysku landleiðirnar", sum verða umrøddir í Lógini um vinnuligan fiskiskap § 2. Sum veljari her í landinum fer hetta at hava mín stóra áhuga.

Frá 1. august eri eg fyrrverandi á øllum arbeiðsøkjum, men eg fari framvegis sum borgari her at ditta mær til at siga mína hjartans meining um øll samfelagsviðurskiftir - og kanska serliga tað øki, sum mær untist at vera á eitt heilt arbeiðslív.

**Gøtu á ólavsøku 2006**



*Veðrið er av tí allarfagrasta, nú riggað verður til Summarfestivalin. Her eru tey í ferð við at seta stjóra tjaldið upp*

# Gera klárt á festival-økinum

**Um fýra dagar byrjar Summarfestivalurin í Klaksvík, og nú síggjast fyrireikingarnar av álvara kring Miðbýin**

SUMMARFESTIVALUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Veðrið tykist vera av tí allarbesta, nú seinastu praktisku fyrireikingarnar til Summarfestivalin skulu fáast frá hondini.

Tá vit í morgun høvdu orðið á Steintór Rasmussen, sum er ein av fyriskiparunum til festivalin, lat hann heilt væl at, og segði annars, at full ferð nú er á fyrireikingunum.

– Í løtuni gera vit klárt til stóra Silva-landið, sum er ætlað børnunum. Hetta fevnir um stóran part av akursmørk, og sjálvir eru vit sera spentir til, hvussu hetta fer at síggja út.

– Og so eru vit sjálvandi eisini farnir í holt við pallarnir. Aftur í ár ahva vit fingið danska hjálp til stóra teltið, sum Festivalurin nú eisini hevur keypt, heldur enn bara leigað, og arbeiðið við stóra pallinum á Vágsbøi er eisini farið ígongd. Her hava vit eisini fingið okkum eitt nýtt ljóðanlegg, so vit eru sjálvandi sera spentir uppá, hvussu hetta fer at rigga, sigur Steintór.

### Vónir um veðrið

At veðrið er av tí besta í løtuni, kemur sjálvandi væl við, nú alt arbeiðið gongur fyri seg uttandura, men fyrireikararnir eru ikki minni spentir um, hvussu veðrið fer at skikka sær um vikuskiftið.

Sjálvur hevur Steintór ein beiggja, sum starvast á donsku veðurstovuni, og hann viðgongur, at tað er ikki heilt frítt, at hann hevur ringt nakrar eyka ferðir seinastu dagarnar.

– Tað er sjálvandi trupult at siga, hvussu veðrið verður í Føroyum eina viku fram, men sum skilst, so síggja fyribils forsagnirnar út til at vera góðar. Og í øllum førum hevur Alex boðað frá, at hann kemur heim til festivalin, so heilt galið kann tað neyvan verða, heldur Steintór.



# Útlendsku nøvnini standa seg væl

Tað tykist, sum hava fyrireikararnir av Summarfestivalinum verið sera heppin í sínum vali av útlendskum nøvnum í ár.

Avtalurnar við hesi verða aloftast gjørdar í góðari tíð, og tí er trupult at vita, hvørt nøvnini eru heit ella køld, tá august mánaði er í hond.

Men sum hesi standa seg í løtuni, er lítil ivi um, at útlendsku gestirnir eisini draga nógv fólk. Johnny Deluxe selur í løtuni fleiri fløgur enn nakrantíð í Danmark. og The Rasmus hava havt sera góð ummæli á síni konsertferð kring heimin. Hartil koma so minni tíðarbundin nøvn sum Roger Hodgson, Shubi-dua og David Phelps, sum uttan iva hava eina velduga atdráttarmegi, tó at málbólkarnir til hesi uttan iva eru ymiskir.

**-mørk**

# Gongst væl við søluni

Hóast hann enn er varin við at staðfesta nakað, so letur Steintór Rasmussen sera væl at atgongumerkjasøluni til Summarfestivalin.

– Higartil eru oman fyri 6.000 atgongumerki seld, og hartil koma so starvsfólk, sponsorar og onnur, sum jú eisini skulu hava armband. So vónin er í øllum førum, at fólkini verða líka nógv, sum tey vóru seinast. Men tað er so nakað, sum seinastu dagarnir fara at vísa. Higartil hevur sølan fyri tað nógva verið í »rykkum« upp undir tær ymsu deadlines, sum hava verið fyri tilboðum av ymsum slag, og royndirnar siga, at tað altíð eru nøkur, sum koma í evstu løtu at keypa atgongumerki. Men hvussu nógv hesi verða, veldst um so nógv. Ikki minst um veðrið, og so eru vit sjálvandi eisini spent um at vita, hvussu fasta sambandið fer at ávirka festivalin.

Men hóast bjørtu orðini, so fæst Steintór ikki at siga nakað um, hvørt hann metir tað vera møguligt at fáa enn fleiri fólk á festivalin í ár.

– Tað fara komandi dagarnir at vísa. Enn sær tað gott út, men tey heilt stóru orðini vil eg ikki brúka, uttan at eg havi nakað at halda hesum í. Og tað er kanska við blandaðum kenslum, at vit nú bíða eftir seinastu døgunum. Sjálvandi vildi tað verið heilt fantastiskt, um øll atgongumerkini vórðu seld, men tað er stórt spell, um tað samstundis standa nøkur eftir, sum kundu hugsað sær at verið við, men sum ikki sleppa.

**-mørk**

